Landsbanki Føroya

# Skjal B Íløgukarmar fyri landskassan, mai 2018

| Max korrigeraði varleiki fyri íløgurøðina er 4 | | Karmar fyri aktivklassa | Hámark fyri einstakan mótpart |
|---|---|---|---|
| 1 | **Grundøki og bygningar** | **0** | |
| 2 | **Onnur dóttirfeløg** | **0** | |
| 3 | **Kapitalpartar (partabrøv)** | **0-25** | 2 |
| | Listaði partabrøv | 0-25 | |
| | Ólistaði partabrøv | 0-5 | |
| | Menningarlandapartabrøv | 0-5 | |
| 4 | **Lánsbrøv** | **0-100** | |
| 4.1 | Ríkislánsbrøv | 0-100 | |
| 4.2 | Realkredittlánsbrøv | 0-100 | |
| 4.3 | Indekslánsbrøv | 0-10 | |
| 4.4 | Kreditlánsbrøv, investment grade | 0-15 | |
| 4.5 | Kreditlánsbrøv, lægri enn investment grade | 0-25 | |
| 4.6 | Onnur lánsbrøv | 0-10 | |
| 5 | **Lán við trygd í fastari ogn** | **0-5** | 5 |
| | Lán til infrakervi | 0-5 | |
| 6 | **Onnur fíggjarlig aktiv** | **0-100** | |
| | Peningastovnskontur | 0-100 | |
| | Hedge fondar, infrakervi og aðrar alternativar íløgur | 0-15 | 2 |
| 7 | **Avleidd fíggjarlig amboð (derivat: optiónir, futures, swap)** | **ja** | |

- Hámarkini eru roknað sum prosentpartur av Minstagjaldførinum.
- Virðisbrøvini verða flokkað í bólkar sambært reglunum hjá Fíggjareftirlitinum.
- Íløgur kunnu gerast í samansetingar av aktivum, um loyvi er at gera íløgur í undirliggjandi aktivini, til dømis íløgufeløg, SPV, CMO ella ETF.
- Um íløga verður gjørd í íløgufeløg við investment grade lánsbrøvum, skulu minst 85% av lánsbrøvunum hava investment grade rating.

Til 3 Partafeløg og íløgufeløg við partabrøvum.
Fyri partabrøv (bólk 3) er ein avmarking á 2% sett fyri hvønn einstakan mótpart. Henda avmarking er galdandi fyri beinleiðis íløgu í eitt partabræv og ikki fyri íløgur gjørdar gjøgnum íløgufeløg

Til 4.1 & 4.2 Íløga í ríkislánsbrøv, donsk realkredittlánsbrøv og samsvarandi fastognarlán (covered bonds) í eurolondum. Í EUR og DKK, annars er neyðugt at kurstryggjað

Til 4.3 Indekslánsbrøv. Í EUR og DKK, annars er neyðugt at kurstryggjað

Til 4.5 Hárentu virkislánsbrøv og menningarlandalánsbrøv eru í hesum bólki.

Til 4.6 Onnur lánsbrøv eru lánsbrøv sum ikki kunnu flokkast í bólkarnar 4.1-4.5.

Til 6 Peningastovnar. Hámarkið er sett so høgt, tí bólkurin umfatar depotkonti hjá íløgurøktarunum, sum tíðum umleggja frá nøkrum virðisbrøvum til onnur.
Í hesum eru tær alternativu íløgurnar, sum ikki kunnu bólkast í øðrum bólkum.
Heimildin til alternativur íløgurnar eru 15%, men fara tær upp um 10%, skal tað leggjast fyri landsbankanevndina.
Bólkurin hedge fondar, infrakervi og aðrar alternativar íløgur kunnu innihalda produkt sum heilt ella partvís eru derivat.

Til 7 Derivat kunnu nýtast til bólkarnar 3 og 4, um derivatini eru avleidd av partabrøvum ella lánsbrøvum, og hava somu ella líknandi váðaeginleikar sum hesi virðisbrøv.
Í bólki 4 kunnu íløgur gerast í aktiuindekseraði lánsbrøv.
Somuleiðis kunnu íløgur verða gjørdar í produkt, sum heilt ella partvís eru derivat, innanfyri karmin fyri bólk 6, hedge fondar, infrakervi og aðrar alternativar íløgur.
Um ~~onnur~~ sløg av derivatum verða keypt, skal hetta leggjast fyri ráðið.